# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



## Andlát og jarðarferðir

**Sonni Eliassen**, Klaksvík, andaðist á Klaksvíkar sjúkrahúsi páskamorgun, 78 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mikukvøldið kl. 18.00 heim í Christianskirkjuna. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni hósdagin kl. 13.

**Jákup Olsen** á Toftum andaðist páskadag, 25 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Jarðarferðin hjá Malmberg **Hera Simonsen** verður úr Sørvágs kirkju hósdagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Malmberg, kunnu lata Krabbameinsfelagnum eina peningagávu. Konta í peningastovunum.

**Frida Thomsen**, Porkeri andaðist týsnáttina á Suðuroyar Sjúkrahúsi, 79 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Mikkjal Joensen**, maskinmeistari í Klaksvík, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum Páskadag, 61 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni fríggjadagin klokkan 13. Tey ið vilja minnast Mikkjal, kunnu lata Javna eina peningagávu.

**Hans Marius Johannesen** úr Dali andaðist týsmorgunin, 68 ára gamal. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 14 úr Vesturkirkjuni. Tey ið vilja minnast Hans Marius, kunnu lata Heilafelagnum eina gávu, konta í Eik Banka.

## ANDLÁT

Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum at, elskaða kona, mamma, vermamma, omma og langomma okkara.

**Frida Thomsen**
Porkeri

andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi
6. apríl 79 ára gomul.

Bønarhald verður í kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi tórskvøldið 8. apríl kl 21:00

Jarðarferðin verður úr Betania í Porkeri leygardagin 10. apríl kl 13:00

*Vegna familjuna*

***Andrew***
***Johan, Meta, Anna og Jónhild***

*Tey, ið ynskja at minnast Fridu, kunnu lata Krabbameinsfelagnum eina gávu*

*Konta í peningastovninum.*

# Mikkjal bróðir farin

Páskadag andaðist Mikkjal Joensen, til gerandis maskinmeistari á Teistanum, bert 61 ára gamal á Ríkissjúkrahúsinum eftir lutfalsliga stutta, men svára og støðugt versnandi, sjúkralegu. Tað var "teringur" við lít, harav hørð viðgerð, og at enda orkaði hjartað ikki meira.

Hann viknaði sera skjótt, tó tá vit ávegis í Samuelskirkjuna páskadag stukku inn á gólvið hjá honum á sjúkrastovuni, tóktist hann ta løtuna vera av tí fræga, prátaði um mangt og hvat, sum hann áður av viknaðinum illa orkaði, og var hann púra greiður og avkláraður ta løtuna.

Komin úr kirkju við uppreisnarboðskapinum í sinni ringdi Lissan, altíð honum so trúføst við lið, at hann hevði fingið hjartasteðg, og at eitt fjølment lið av læknum í skundi arbeiddu upp á hann, men stutt eftir var hann so farin um evstu sýn. Har var hjá mannaviti og kynstri einki meira at gera. Ófatiligt at ein so vælvaksin og prúður maður kundi fara soleiðis upp á so lutfalsliga stutta tíð.

Mikkjal vaks upp saman við okkum trimum systkjum í fjøruni á Biskupsstøð í Klaksvík, og gjørdist sjólívið eisini hansara verkliga lív.

Av okkum fýra faðirloysingum var hann, 1½ ára gamal, nokk tann eftir bókini verst staddi, tá pápin brádliga fór av somu herviligu sjúku, og mamman tessvegna bleiv so upptikin av arbeiði, men vit høvdu góðar og trúgvar arbeiðskonur, sum sanniliga vóru góðar við okkum.

Men sum barn var hann serliga følin bæði so og so, treivst illa og var nógv undir læknahond fyri tað sama. Tó komin til mans fór at bragda. Hann fór í smiðjulæru og á maskinistskúla og haðani at sigla sum slíkur við trolarum á fjarleiðum, haðani út í víðu verð við farmaskipum og seinastu mongu árini við skiftandi strandfaraskipum, harav fastur maskinmeistari á m/f Teistanum um



*Lissan og Mikkjal*

Skopunarfjørð frá nýbygningi av.

Honum dámdi væl sítt gerandisarbeiði og sat spaklyntur væl um sátt við øll síni samverkafólk. Hann gjørdi lítlan háva burtur úr sær, var hugsandi, tolin, stillførur og beskeðin, so sum tey eisini varnaðust á Ríkissjukrahúsinum. Hann fekk víða hvar mangar trúfastar vinir fyri lívið. Hann var hugnaligur at vitja og at fáa vitjan av og dugdi so frágera væl at fortelja við góðum og sømiligum humori, tá tað lagið var á honum.

Seinnu mongu árini vóru framburðsár hjá Mikkjali, sum eisini veittu megi at bera so svárt bakkast sum at missa lítlan abbason í ferðsluvanlukku.

Uppvaksin við sjógvin fekk hann sær fyrst lítlan bát, síðani ein størri og so ein uppaftur størri, hartil skúr, eins og hann nú hevði víðari ætlanir av somu skuffu langt inn í sjúkdómin.

Felags fyri hansara frítíðarítriv var, at hann keypti gamalt av øðrum avlagt fyri síðani at brúka sítt tøkniliga vit og skil umframt frálíka handalag at evna vælaverk buturúr.

Góður í ráðum og verki hjá mær og øðrum, eins og hansara egnu verkligu forløg vitnaðu um fakligt vit og frágera gott handalag: heimið í Klaksvík, frítíðarhúsini í Skálavík og ikki at forgloyma báturin. Har var alt, sum tað átti at vera og í góðum standi. Hugsaði mítt, har hann júst andaður lá við faldaðum enn flógvum hondum, at gævi eg sjálvur átti slíkar hendur og eitt sindur av hansara tøkniliga snildi og toli.

Deyðans koma er løgin, og vit enn livandi kunnu so illa siga frá, men kanska gáa um.

Og helst verða vit á deyðastrá aftur sum børnini, at vit leys av verðsins meldri í størri mun gáa um tað hóast alt mest persónliga týðandi.

Soleiðis var Mikkjal ta seinastu tíðina. Verðsins larm og alt hansara í okkara annara eygum virðismikla tímiliga orkaði hann vegna sjúkuna ikki longur at sýna áhuga fyri. Hansara einasti áhugi var konan, børnini og abbasynirnir, sum høvdu so stóran týdning fyri hann. Og so nærleikin, serliga tann kropsligi, og hetta uttan óneyðug orð, at kunna vera ósvikaliga nær og hjá á neyðarstund, so sum Lissan var nú í fleiri so strævnar mánaðir.

Mikkjal var sum barn følin og kensluliga viðkvæmur, men vaks upp til mansevni og við vinnandi sinnalagi. Hann endaði sínar dagar sum líka so følin og viðkvæmur, spakur og lítillátin.

Hann giftist Lissuni av Toftum, og fingu tey børnini Jóhonnu og Ása umframt fyribils tveir abbasynir á lívi, Hugin og Nóa, sum hann forgudaði og ikki minst tann farna Róa.

Hann verður saknaður av okkum og mongum víða hvar.

Hvíl í friði.

**Eyðun, bróðir, og Karin við familju**

**Gullbrúdleyp**
Mánadagin 12. apríl kunnu hjúnini Ruth og Billy Olsen halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni.



**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 17. apríl hava Helga og Jørgin Gleðisheygg Nes, Gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík, kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin. Tey ið vilja gleða okkum við at koma verða biðin um at siga frá innan 8. apríl á tlf. 447160 ella 270876

**Brúdleyp**
Leygardagin 24. apríl giftast Joan Simonsen, Saltangará og Rúni Jallson Niclassen, Skáli. Vígslan verður í Glyvra kirkju kl. 14. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða Brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg innan 10. apríl á tlf. 262713, 448051 (Joan) ella 256043, 441603 (Rúni).

**Brúdleyp**
Leygardagin 10. apríl giftast Jóna Johannessen, Tórshavn og Rúni Hvannastein, Kaldbak. Vígslan verður kl. 13 í Býráðsalinum í Havn. Veitslan fyri innbodnum verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.

